


LØGTINGSVALIÐ 19. JANUAR 2008

# Kommunulæknaskipanin skal virka



Val

EYÐGUNN SAMUELSEN
Javnaðarflokkurin

Endamálið við nýggju kommunulæknaskipaninin var at gera hesa tænastu betur fyri borgaran. Nógvastaðni, og serliga í Klaksvík, er tørvurin á kommunulæknium stórur.

Tí skuldi skipanin lætta um teirra arbeiðsbyrðu, tí tað er ongin loyna, at ein kommunulækni, ið einsamallur hevur vakt dag og nátt í longri tíð, kann vera so strongdur at tað kann geva eina verri tænastu til sjúklingin.

Ein trupulleiki í Klaksvík er, at vit bert hava ein fastan kommunulækna í Klaksvík. Hinir 2-3 ið eru her, eru avloysarar ið koma her eina stutta tíð og fleiri av teimum eru útlendingar, hesir kenna als ikki viðurskiftini í Føroyum og tað skapar trupuleikar við skipanini. Virkar skipanin rætt, so skuldu eysturoyingar, í nógv størri mun enn í dag notið gott av tí veldugu kvalitetsøking, ið avstandurin til Klaksvíkar sjúkrahús er styttur, síðan tunnilin kom. Vit eiga eitt stak gott sjúkrahús í Klaksvík, tað prógvaði nøgdsemiskanningin eisini, so nú eru tað ikki bara vit her norði ið vita av tí, men alt Føroya fólk.

Í løtuni verður kommunulæknaskipanin eftirmett og tað skal ongin ivi verða, skipanin skal fáast at virka. Ein loysn, ið sambært fakfólkinum hevði bøtt munandi um skipanina er at fáa koyrilæknan inn á sjúkhúsið. Er tað tað ið skal til so skal tað gerast.

Javnaðarflokkurin hevur haft ein landstýrismann í almanna- og heilsumálum, síðstu 4 árini, ið hevur gjørt eitt stórt arbeiði fyri at bøta um tænasturnar í sjúkhúsverkinum, tað vita tey ið arbeiða innan øki fulvæl. Góðu Norðingar lat ongan iva vera um, at seta tit tykkara álit á Javnaðarflokkin tann 19 januar, so fara vit at tryggja at kommunulæknaskipanin fæst at virka.

# Trivnaður ikki olmussa men rættindi



Val

NIKLÁI PETERSEN
Tjóðveldi

Lítið virðuligt at nýta tey gomlu, sjúku og veiku í tí politiska spælinum, nú valdagurin nærkast, og krossurin skal setast.

Politisku fríggjaraherindini mótvegis teimum gomlu, sjúku og veiku í samfelagnum fyri at skaffa sær sjálvum nakrar atkvøður, tykjast ongan enda at taka. Hetta er sama framferð undan hvørjum einasta vali.

Eg haldi, hetta er lítið virðuligt og ússaligt fyri hesi somu soleiðis at verða "misnýtt", nú tað stundar til val, tey hava sanniliga annað uppiborið.

Hesi skulu ikki nýtast til politiskan løtuvinning og atkvøðufiskarí.

Hesi økir eru eftir mínum tykki sjálvsøgd rættindi og harvið ein samfelagsskylda, sum allir flokkar eiga at loysa í felag uttan um politisk mørk.

Latið okkum tí taka lógvatak saman og fáa loyst hesi viðurskifti á ein virðuligan og sámuligan hátt, allari tjóðini at gagni.

# Tey gomlu og ellisheim



Val

EYÐUN MOHR VIDERØ
Valevni Fólkafloksins

Síggi í skrift og hoyri í talu, at nógv valevni eru sera upptikin av, hvussu umstøðurnar hjá teimum gomlu eru, tá tey ikki longur eru før fyri at klára seg heima. Nógva staðni er tørvurin á ellis- og røktarheimsplássum nógv størri, enn verandi umstøður kunnu nøkta!

Í valtekniskum máli verður sagt, at tað nyttar onki at tosa um tað, sum tú hevur gjørt, men tú mást tosa um framtíðarætlanir.

Hjá mær er ilt at koma uttanum, at eg havi verið virkin í politikki í mong ár, so hvussu skal veljarin meta um val av einum sovorðnum, uttan hann kann vísa, hvat hann higartil hevur framt og verið við til at framt?

Á eldraøkinum hevði eg sum lokalpolitikari eitt tógvi stríð fyri at fáa sett í verk ellisheimini í Sandoy. Hetta var ein stór íløga, og í mun til umstøðurnar aðrastaðni vildi henda íløga nøkta allan tørvin til ellis- og røktarheimspláss í Sandoynni. Sum formaður fyri kommunalu nevndini skuldi kempast við og ímóti, júst sum nú, ov stórari peninganýtslu, og hyggjast mátti nærri eftir neyðugum "prioriteringum"!

Kendir politikarar eru í fremstu røð í dag, ið eg mátti stríðast við og sannføra um hesa gagnliguhóast dýru- íløgu.

Tað tolna, meðvitandi og áhaldandi stríðið endaði kortini við, at ellisheimini standa virkin í dag. Og tey kunnu nøkta allan tørv í oynni!

Hesi heim hava nú virka í fleiri ár, og sjálvur haldi hesi vera ein virðiligan varða um gott og gagnligt politiskt arbeiði!

# Jarðarlóggávan tíðarhóskandi ?



Val

ÓSKAR EIRIKSSON
Fólkaflokkurin

Tað má sigast, at Føroyar frá skaparans hond ikki eru millum best skikkaðu lond til nútíðar jarðabrúk.

Vit uppliva rembingar innar okkara landbúnaðarvinnu. Eins og á sjónum leggja menn jørð saman í størri eindir, og aldargamlar siðvenjur rista í teirra grundvølli.

- Hvat høvdu teir gomlu sagt, verður ofta tikið til.

Men vit mugu síggja veruleikan í eyguni og ásanna, at framburðsmenn innan hesa vinnu leggja á annan bógv.

Kanska eitt hitt fremsta dømi er aldargamli mentunardepil føroyinga, Kirkjubøgarðurin.

Ein framsíggin nútíðar bóndi gongur nýggjar leiðir og gerst ferðavinnubóndi.

Lat okkum skapa karmar til tess, at enn fleiri alternativ kunnu gerast til okkara alt ov sterka bundni til veiðusamfelagið.

Kross við Fólkaflokkin. Her virka vit!

Les meira á www.folkaflokkurin.fo

# Ein hendingarík veiðuferð - ongin ísbjørn, men tríggir tannhvalir



Val

TORDUR J. NICLASEN
Miðflokkurin, listi H

Í summar var eg, saman við synunum báðum, á veiðuferð í Eystur Grønlandi. Vit sigldu við einum 27 føts báti norð móti Nansens fjørðinum. Við á ferðini var ein dani og grønlendskur veiðumaður. Dýrdarveður, spegilsblankir firðir, ísfjøll og ísur so langt eygað rakk.. Ei heldur fóru vit til húsar "ongul í reyv" – nei, 3 narhvalir (tannhvalir) vórðu harpuneraðir og fingnir til høldar.

Stórsligin og ógloymandi túrur við mongum upplivingum.

Komnir nakað ávegis suðureftir á heimferðini, peikar grønlendski veiðumaðurin móti landi og spyr um vit síggja eina lítla oyggj einar 2 fjórðingar úr landi. Jú , tað gjørdu vit. Og so sigur hann hesi orð, sum brendu seg fast í sinnið:"Fyri 10 árum síðan var eingin oyggj at síggja – tí tá var hon fjald av einum gletstchara"

Segði nakar "dálking" ??

Umráðandi at taka umhvørvisspurningin í álvara og stuðlar avgerðum og tiltøkum sum minkað um dálking!. Hetta ásannandi, at tað er okkara ábyrgd og skylda at geva børnum og eftirkomarum okkara góð kor at liva undir. Vit hava ábyrgd mótvegis Skapanarverkinum!

Sum ein av stovnarum floksins fegnist eg stórliga um ta undirtøku flokkurin hevur millum veljaran.

Ein undirtøka, sum er neyðug, um flokkurin framhaldandi skal hava ávirkan.

Miðflokkurin verjir virðini – og tað er av týdningi at vita! Ikki sannheit?

# Samband og Loysing



Val

SIGMUND ANDREASEN
Miðflokkurin H

Nú valgi nærkast royna sitandi landsstýrismenn at ávirka veljaran við ræðandi avleiðingum, um ikki sambandið fær fleiri manns á ting, teir hava roynt seg, og fylgirnar merkja tit, góði veljarar latið tykkum ikki ræða, tí onki av slíkum málum vera avgjørd á tingið uttan at ein fólka atkvøða verður gjørd so meirilutin kemur altið at hava síðsta orðið í slíkum stórmálum.

Er tað nógv gott vit kunnu líta aftur á í farna vælskeiði?

Sum altíð uppundir eitt væl, koma nógv uppskot á ting í síðsta tíma, bert fyri at kunna fortelja veljarum hvat teir hava gjørt, ósemja kom á sitandi ABC flokkar, so at løgmaður mátti skriva út væl. Høvusvinnan er sjógvurin og ríkidømi sum har fæst, sjálvt um allir siga at hetta er Føroya ogn, so verða hesi virir seld av landinum, tað er komið spekulatión í vinnuna, strámenn í Føroyum við pengasterkum Islendingum og Norðmonnum fara avstað við Føroya ogn, Tað er tosa um at fáa ein fiskidagabanka at fora fyri spekulatiónini av fiskiloyvum, men okkar fiskimenn, teir sum eru í hesu vinnu, vera sjálvdan spurdir um hvat er best fyri teir og teirra familjir, góði veljarar tykkara krossur kann gerast avgerandi, sitandi samgonga megnaði ikki at fáa skil á hesum rossahandlum kanska teir vóru ein partur av tí, men vit í Miðflokkinum vilja gera okkara til at rudda upp, um vit fáa tykkara stuðul, gott væl.